# Soleiðis skal Manhattan síggja út



*Bygningurin hjá Fumihiko Maki líkist World Trade Center*

**Trý háhús skulu byggjast ísiatðin fyri World Trade Center umframt „Freedom Tower“**

Líka síðani tey bæði tornini hjá World Trade Center rapaðu fyri fimm árum síðani, hava fólk í New York tosað um, hvat skal byggjast ístaðin fyri umframt „Freedom Tower“, sum fór í gerð fyri einum lítlum hálvum ári síðani.

Í sambandi við fimm ára dagin hava tríggir kendir arkitektar skotið upp at byggja trý háhús, har World Trade Center stóð. Norman Foster, Richard Rogers og Fumihiko Maki hava kortini samstarvað um uppskotini, tí teir høvdu sett sær fyri, at teir tríggir bygningarnir skulu síggja út sum ein eind og hóska til hvør annan.

Úrslitið er trý háhús, sum verða ávikavist 411, 382 og 288 metrar høg. Tey verða millum hægstu bygningarnar í New York, men tey koma kortini at standa í skugganum av tí 541 metrar høga „Freedom Tower“.

Felags fyri allar tríggjar bygningarnar er, at hvør einasta hædd verður úr glasi líka úr gólvinum upp undir loftið. Tann lægsta bygningin hevur Fumihiko Maki teknað, og hann minnir mest um tey bæði tornini, sum rapaðu í grund fyri fimm árum síðani.

Tað er heldur ikki av tilvild, at teir tríggir bygningarnir og „Freedom Tower“ eru ymiskir til hæddar, tí tað er gjørt eftir uppskoti hjá tí navnframa arkitektinum Daniel Libeskind. Hansara hugskot var at byggja fýra háhús, sum skuldu standa rundan um minnisvarðan, sum er gjørdur til minnis um tey, sum doyðu tann 11. september í 2001. Minnisvarðin er ein fossur og tveir vatnbrunnar.

Enn er ikki greitt, nær arbeiðið at byggja tey trý háhúsini byrjar, men eftir ætlanini skulu øll trý húsini standa liðug í 2012. Tað er heldur ikki greitt, hvat tað fer at kosta at byggja húsini.




**Starvsfólk aftaná skúlatíð til Baresso Coffee**

SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Gongur tú í skúla, hevur tú møguleika at søkja um arbeiði hjá okkum. Starvið verður sett frá 18. oktober 2006.

Arbeiðsuppgávur: At gera reint og rudda har gestirnir sita • At tryggja at uppgávur viðvíkjandi reingerð og annað, sum er neyðugt, verður gjørt • At gera kaffistovuna reina eftir afturlatingartíð og annars gera klárt til dagin eftir • Tilgerð og borðreiðing av okkara sermerktu kaffisløgum, køkum, tvíflísum og øðrum matvørum • Geva gestum góðar upplivingar við einum smíli.

Vit vænta av tær: At tú ert ágrýtin • Tú dugir at halda kaffistovuna reina og nossliga, tí hetta hevur stóran týdning fyri, at okkara gestir føla seg væl • Tú hevur eitt vinnandi smíl og ert í góðum hýri, so onnur gleðast við tær • Tú dugir væl at samstarva • Tær dámar at gleða onnur við tínum ágrýtni. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990.

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN